FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Setursskrivstovan

**Mannagongd:**
Leiga av hølum

| | |
|---|---|
| Journalnr. | 0.000 |
| Dagfest | 12.11.2014 |
| Útgávunr. | 1 |
| Ábyrgd | Fyrisitingarstjórin |
| Góðkent | Leiðslan |

## Mannagongd fyri leigu av hølum á Fróðskaparsetri Føroya

Tá talan er um uttanhýsis leigu til privatpersónar, bólkar og felagsskapir eru hesir prísir galdandi:

- Aulan á Námsvísindadeildini 3000 kr. um dagin
- Fyrilestrasalurin í Jónas Broncks gøtu  2000 kr. um dagin

Fróðskaparsetrið leigar ikki onnur hølir út. Tó kunnu Loftsstovan og Skúlastovan á Føroyamálsdeildini lænast út til samstarvsstovnar og feløg uttan kostnað eftir avtalu við deildarskrivstovuna.

Tann , sum leigar hølir frá Fróðskaparsetrinum, skal vísa á eitt ábyrgdarfólk, ið heftir persónliga, um nakar skaði hendir nøkrum av ognum Setursins.

Hølini skulu latast aftur í sama standi. Um ikki, verður rokning send.

Fróðskaparsetrið vaskar aftan á, men um annað er at taka upp, verður rokning send leigaranum fyri hetta.

Leigan skal vera goldin, áðrenn hølið kann nýtast. Hetta verður gjørt á deildarskrivstovuni á avvarðandi deild. Samstundis verður goldið eitt depositum áljóðandi 200 kr. fyri lykil.

### Innanhýsis lán av hølum

Øll starvsfólk á Setrinum, her íroknað ph.d.- lesandi, sum eru sett minst hálva tíð, hava rætt til at lána øll hølir á Setrinum uttan kostnað, treytað av, at hølini eru tøk. Studentar kunnu lána høli til studentatiltøk eftir avtalu við avvarðandi deildarskrivstovu.

Hølini skulu latast aftur í sama standi, sum tey vóru fingin í.

Góðkend á leiðslufundi 11. november 2014